

Pallurin, sum hevur staðið fyri boringum á Solanleiðini vestan fyri Hetland.

# Nýggjar olju- og gassleiðir nær Føroyum byrja skjótt framleiðslu

**Jan Müller**

24.12.2015 - 11:57

Oljan.fo

Í næstum byrjar framleiðslan á tveimum nýggjum olju- og gasskeldum skamt frá føroyska markinum. Talan er um fyrstu veruliga gassframleiðsluna á Atlantmótinum, Laggan Tormore, har Total er fyristøðufelag og sum er sett til at byrja seinast í hesum árinum, og síðani um eina nýggja oljukeldu har suðuri á Atlantsmótinum, kallað Solan. Har er Premier Oil fyristøðufelag.

Báðar verkætlaninar eru seinkaðar, í stóran mun vegna veður. Nógvir ódnirnar í seinastuni hava rakt oljufeløg, sum standa fyri útbyggingum, dyggiliga. Vegna áhaldandi vánaligt veður hevur verið torført  at flyta arbeiðsfólk millum íbúðarpall og framleiðslupall.

Solan, sum er ein ómannaður framleiðslupallur nærhendis kendu oljuleiðunum, Foinaven og Schiehallion, er ein spennandi nýroynd innan oljuframleiðslu. Talan er um at fáa upp olju úr sjálvum grundfjallinum, ”basement”. Talan er um olju, sum er likin niður í grundfjallið. Hetta slagið av oljumiðjum kann gerast kollveltandi fyri framtíðar oljuframleiðsluna vestan fyri Hetland og er tað serstakliga hetta eina felagið, Premier Oil, sum hevur speciealiserað seg til hesa framleiðsluna. Vónir eru um at finna fleiri líknandi felt í grannalagnum. Higartil eru funnin fleiri slíkar oljuleiðir, sum er ætlanin verða bygdar út í framtíðini. Nær er tó ilt at siga, nú oljuprísurin hevur fingið so stóra ávirkan á mangar av útbyggingunum yvirhøvur.

Solan keldan varð funnin í 1990, men ikki fyrr enn nú er hon búgvin til at fara undir framleiðslu.